Alt er opið

Sæð burtur frá VB, so tykjast flestu kvinnuliðini sera jøvn. Mikukvøldið fara StÍF og Neistin at gera av, hvørt av teimum skal elta oddaliðið úr Vági

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eiansta faktum, sum higartil hevur verið at líta á í bestu kvinnudeildini, er, at VB vinnur, tá tær eru á vøllinum. Fyri hini liðini hevur verið galdandi, at avrikini hava verið sera misjøvn, og tí tykist tað mest sum í hvørjum einstøkum føri at vera púrasta opið, hvussu tað fer at hilnast.

Tað verður ein dystur um, hvørt av liðunum skal fylgja við oddinum, tá Neistin mikukvøldið vitjar á Skála

Mikudagin skulu StÍF og Neistin takast á Skála, og hesin dysturin er einki undantak í so máta. Fyri báðar partar er galdandi, at skulu tey hava ein møguleika at fylgja við í oddinum, so krevjast helst tvey stig burtur úr dystinum.

Hjá StÍF var tað uttan iva eitt gott sálarligt skump, tá tær vunnu á VÍF fyri viku síðani, og nú skulu tær so royna at fylgja upp á hendan sigurin. Stóri spurningurin er tó helst, hvussu verður við Astu Petrauskiene. Hon meiddi sær fótin móti VÍF, og tó at hon helst verður á vøllinum í kvøld, so kann hetta hugsast at darva nakað.

Hjá Neistanum tykjast allar at vera tøkar til dystin, og einki er at ivast í, at tær fara á vøllin fyri at prógva, at tær framvegis eiga eitt orð at siga í føroyska hondbóltsoddinum. Hvussu hetta fer at eydnast, er so ein annar spurningur.

Klassikarin livir

Seinnu árini hevur VÍF verið greiður favorittur, men nú líkist tað einum rættiligum braki, tá Kyndil kemur á vitjan, og á Skála verður oddabrak millum StÍF og Neistan

MANSHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað er eingin ivi um, at stóri klassikarin í føroyskum manshondbólti stendur millum VÍF og Kyndil. Mangan hava dystirnir verið bæði harðir og tættir, men seinnu árini hevur tað tókst, sum um einkarstøðan hjá VÍF í mansoddinum hevur tikið nakað av spenninginum úr hesum dysti.

Í ár er tó øðrvísi. Bæði tí VÍF longu hevur tapt tvær ferðir, og sostatt hevur avdúkað nakrar veikleikar, men eisini tí Kyndil nú tykist vera betur fyri, enn teir leingi hava verið.

Sámal úti

Hjá VÍF ræður í løtuni kanska mest av øllum um ikki at missa takið í oddinum, so í teirra verð er tað helst bert ein sigur, sum kann góðtakast. Tað mundi tó vera dyggur smeitur fyri gullvánirnar í Vestmanna, at Sámal Joensen nú verður úti fyri restina av hesum kappingarárinum. Sámal meiddi sær knæið herfyri, og nú er so staðfest, at talan er um krossbandsskaða.

Hjá Kyndli vóru hvørki Janus Einar Sørensen ella Hans Áki Dal-Christiansen við seinast, men teir eru væntandi tøkir mikukvøldið. Tað er Hanus Jensen hinvegin ikki. Hann fekk reytt kort móti H71 herfyri, og hevur tískil leikbann.

Oddabrak á Skála

Tveir aðrir dystir eru eisini á skránni mikukvøldið. Í Runavík kemur KÍF á vitjan hjá Tjaldri, og tó at talan er um tey bæði niðastu liðini á stigatalvuni, so er lítið at ivast í, at KÍF eru stórfavorittar. Tilgongdin av útlendsku leikaurunum hevur at kalla hamskift liðið, og eftir at teir fingu tvey stig burtur úr VÍF, er einki at ivast í, at kollfirðingarnir hava sett sær hægri mál enn at vera partur av botnstríðinum.

Seinasti dysturin er á Skála, har Neisitn kemur á vitjan. Hetta er samstundis talan um tvey av liðunum, sum liggja best fyri í løtuni. Neistin hevur kanska ikki eins stór nøvn, sum teir høvdu í fjør, men liðavrikið hevur hinvegin verið framúr hvørja ferð, og í løtuni eru teir fremstir á talvuni.

Strandingar taptu fyrsta dystin fyri Kyndli, men síðani hevur talan bara verið um sigrar, og fáa teir enn eina ferð fult burturúr, eru teir í øllum førum ájavnir oddaliðnum í deildini, so spennandi verður tað undir øllum umstøðum á Skála.

Eftir nøkur ár, har klassikarin hevur tókst heldur vatndoyvdur, er lagt upp til satt hondbóltsbrak, tá Kyndil vitjar í Vestmanna mikukvøldið

Veðrið argaði

Orsakað av illveðrinum um vikuskiftið vórðu fleiri bridgedystir í FM-liðkappingini í Klaksvík avlýstir um vikuskiftið. Enn er óvist, nær hesir verða leiktir

BRIDGE
Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen

Hví er altíð illveður, tá vit skulu leika bridge í Klaksvík? Soleiðis spurdi onkur, nú ið tey fyrstu umførini fyri lið skuldu leikast í Klaksvík. Ikki eru vit harrar yvir veðrinum, og seinasta vikuskifti vildi føroyski veturin eisini hava ein fingur við í spælinum. Leygardagin gekk eftir vild, og tvey umfør vórðu leikt. Men sunnudagin høvdu leikarar ikki sitið leingi við bridgeborðini, tá tað frættist, at strandfararskipið um Leirvíksfjørð, Dúgvan, sigldi seinasta túr seinnapartin klokkan trý. Avgjørt var tí, at avblása dystirnar, ið vóru í gongd, so fólk fingu møguleika at sleppa til hús aftur.

Nær, ið teir avlýstu dystirnir skulu leikast, er ikki greitt enn. Ein møguleiki kundi verið sunnudagin 2. februar, dagin eftir at FM-semifinalan fyri pør skal leikast í Havn.

Junior Buss Taxa og Hallur Ellingsgaard
Eftir tvey umfør í 1. deild liggur liðið hjá Junior Buss Taxa fremst. Á liðnum hjá Junior Buss Taxa leiktu Bogi Simonsen, Rói á Rógvu Joensen, Hans Jacob Petersen og Arnbjørn Sivertsen. Teir báðir ungu leikararnir Gunnar Mouritsen og Høgni Vesturklett eru eisini við á liðnum, men teir høvdu so frí í Klaksvík.

Í 2.deild vann liðið hjá Halluri Ellingsgaard báðar sínar dystir við maksimum stigum og liggur sostatt klárt á odda. Á liðnum hjá Halluri leika umframt liðskiparan eisini Eirikur Joensen, Dia Petersen, Hans Egil Joensen, Reimund Langgaard og Edmund Joensen.

Næstu ferð, leikt verður FM fyri lið, verður í Havn vikuskiftið 22-24. november. Tá verða eftir skránni fýra umfør leikt, og spælt verður bæði fríggjakvøld, leygardag og sunnudag.

Úrslitini í Klaksvík:

Leygardagin 2.nov.
1. deild

Junior Buss Taxa — Jórun Johannesen	18-12
Allan Dal-Christiansen — Carl Mikkelsen	14-16
Símin Lassaberg — Jóna Grunnveit	16-14

2. deild

Dia Jacobsen — Hallur Ellingsgaard	01-25
Danny Transport — Eyðun S. Olsen	10-20
Jens Pauli G. Nolsøe — Petur Winther	10-20
Odd Fjallsbak — Marita Krosstein	08-22

Leygarkvøldið 2.nov.
1.deild

Jóna Grunnveit — Junior Buss Taxa	05-25
Allan Dal-Christiansen — Símin Lassaberg	25-05
Carl Mikkelsen — Jórun Johannesen	13-17

2.deild

Eyðun S. Olsen — Dia Jacobsen	2-18
Petur Winther — Danny Transport	17-13
Marita Krosstein — Jens Pauli G. Nolsøe	12-18
Hallur Ellingsgaard — Odd Fjallsbak	25-04

Sunnudagin 3.nov
Allir dystirnir avlýstir fyri veður!

Støðan 1.deild

1. Junior Buss Taxa	43
2. Allan Dal-Christiansen	39
3. Jórun Johannesen	29
4. Carl Mikkelsen	29
5. Símin Lassaberg	21
6. Jóna Grunnveit	19

Støðan 2.deild

Hallur Ellingsgaard	50
Petur Winther	37
Marita Krosstein	34
Eyðun S. Olsen	32
Jens Pauli G. Nolsøe	28
Danny Transport	23
Dia Jacobsen	19
Odd Fjallsbak	12

FM blandað pør

Leygardagin 9. november kl. 14.00 verður FM fyri blandað pør (mix) í Bridgehúsinum í Gundadali. Spæld verða umleið 40 spøl. Tey pørini, ið enn ikki hava teknað seg, skulu gera hetta sum skjótast hjá kappingarleiðaranum í FBS, Marjun Restorff, á telefon 31 91 42 ella 26 22 20.

Todi kennir seg settan uttan fyri av órøttum

framhald av síðu 8

Samráðingarnar millum FCK og føroyska álopsspælaran verða ikki tiknar uppaftur fyrren síðst í november

ÚTISETI
Jóannes Hansen

Í hesum kappingarárinum er Todi Jónsson einasta føroyska umboðið í superliguni. Tað tykist liggja í kortunum, at í hvussu so er ein føroyingur verður í ella í nánd av superliguni komandi ár. Talan er um Jón Róa Jacobsen, sum í fyrstu atløgu er leigaður úr HB og til Brøndby.

Um Todi Jónsson verður í superliguni, og um hann verður í FCK, er ógreitt. Sáttmálaskeiðið verður runnið 30. juni 2003. Hóast FCK hevur lagt nýtt sáttmálauppskot fyri Toda, og hóast Todi hevur givið til kennar, at hann er fegin um at vera í FCK, og at hann einki hevur ímóti at halda fram í felagnum, so er tað ikki greitt enn, um hann fer at halda fram. Og nú er greitt, at tað verður einki avgjørt, fyrrenn hesin mánaðin verður liðugur.

– Eg havi havt fund við FCK leiðsluna um framhaldandi samstarv. Úrslitið av fundinum var, at ongar samráðingar verða aftur fyrrenn eftir, at fótbóltskappingin verður farin í vetrarfrí síðst í hesum mánaðinum, sigur Todi Jónsson á heimasíðuni todi.fo

Uttanfyri av órøttum

Í kvøld skal FCK spæla í fimta umfarinum í steypakappingini. Teir skulu til Herfølge, har gamla felagið hjá Jákupi Mikkelsen tykist hava fingið nýggjan íblástur. Herfølge er fremst í 1. deild, teir verða roknaðir sum besta boðið upp á uppflyting, og tað er einki at ivast í, at FCK fer at fáa úr at gera í kvøld.

Todi Jónsson er ímillum teir útvaldu hjá FCK, og tað eru góðar vánir fyri, at hann verður ímillum teir fyrstu ellivu. Peter Møller, som er toppskjútti í superliguni, og tískil verður mettur sum fyrsta valið í FCK álopinum, er so mikið skaddur, at hann ikki verður á vøllinum í kvøld, og Jörgen Pettersson var mánadagin ikki komin meiri fyri seg eftir lærskaðan, sum sunnudagin helt honum burtur frá Parkini, enn so, at hann bara vandi við hálvari ferð. Tí luktar tað av, at Todi Jónsson og Sibisusu Zuma fara at manna álopið hjá FCK.

Í FCK er lagið sera gott. Tá ið teir vandu mánadagin, var ein fjøld av pressufólki kring venjingarvøllin á Frederiksberg. FCK hevur fingið nítjan av teimum síðstu 21 stigunum, sum teir hava spælt um, og hóast størri helmingurin av kappingarárinum framvegis er eftir at spæla, so er gulldeymurin longu ramur.

Men hóast tað so at siga bara er undanvindur, og hóast FCK er á aldukambinum, so hevur Todi Jónsson gjørt av at steðga við sáttmálasamráðingunum. Tað ger hann, tí hann ikki er vísur í, hvønn lut hann er ætlaður at eiga á vøllinum í framtíðini. Todi sat á beinkinum í seks dystum á rað, áðrenn hann sunnudagin slapp upp í part og varð valdur til dagsins spælara. Og Todi dylur ikki, hvussu hann hevur kent tað at sita á beinkinum:

– Eg havi sitið nógv á beinkinum, og eg havi kent tað vera av órøttum. Nú má eg fáa at vita, hvar eg standi ítróttarliga í felagnum. Áðrenn eg skrivi undir nýggjan sáttmála við FCK er neyðugt hjá mær at fáa eina greiða fatan av, um ætlanin er, at eg eisini í framtíðini skal siga so nógv á beinkinum, sum eg havi gjørt í heyst, sigur Todi Jónsson, sum sunnudagin vísti, at hann framvegis avgjørt hevur førleika at vera við á hægsta støði.

Kappingarneytarnir hjá Toda Jónsson eru fyrst og fremst Sibisusu Zuma, Peter Møller og Jörgen Pettersson. Svenski FCK venjarin, Hans Backe, hevur verið við til at keypa teir báðar seinast nevndu til felagið, og í síðstu viku var hann við til at avgera, at nýggjur trý ára sáttmáli skuldi skrivast undir við Zuma. Todi hevur áður sagt, at hann í heyst hevur hildið, at venjarin hevur havt serligan hug at brúka spælararnar, sum hann hevur verið við til at keypa til felagið, og at hetta hevur gingið út yvir spælitíðina hjá Toda.

Støðan hjá Toda í FCK og harvið møguleikin fyri framtíðar samstarvi tykist ikki minst verða treytað av, um venjarin fram ímóti vetrarsteðginum fer at geva føroyska álopsspælaranum spælitíð, og hvussu hann fer at standa seg – um hann yvirhøvur fer at sleppa framat.

Úrslitið av fundinum var, at ongar samráðingar verða aftur fyrrenn eftir, at fótbóltskappingin verður farin í vetrarfrí síðst í hesum mánaðinum, sigur Todi Jónsson um framtíð sína

– Men teir koma eisini øðrum í vanda, tí teir fáa heldur ikki komið øðrum til hjálpar, duga teir ikki at brúka útgerðina.

Hann leggur tó dent á, at hesar viðmerkingar einki samband hava við teir seinastu tilburðirnar, har opnir bátar hava siglt á land, tí tey viðurskiftini kennir hann onki til.

Fleiri møguleikar

Don Petersen vísir á, at nú á døgum eru fleiri møguleikar at fáa neyðboð frá sær, skuldi ein álvarslig stoða tikið eg upp.

– Eitt er, hvat lógin krevur, eitt annað er, hvat útróðrarmenn sjálvir hugsa um at fáa sær umborð á bátin fyri at hava so góða trygd sum gjørligt fyri teirra egnu skyld.

Eitt er vanliga neyðarkallið á vhf.

Men nú á døgum er eisini eitt sum eitur »Digital Selective Calling«, vanliga stytt DSC. Á føroyskum kallast hetta »talgilt úrveljandi kall«.

Teir nýggju Vhf sendararnir, sum ikki eru lógarkravdir, enn, í hvussu so er, hava ein reyðan neyðknøtt. Er vhf sendarin íbundin GPS, opg trýst verður á neyðknøttin, sendir hann í somu løtu neyðarkall til allar aðrar bátar við somu útgerð og til Tórshavn Radio, sum hevur vakt 24 tímar um samdøgurið.

Samstundis sum sjálvvirkandi neyðarkallið verður sent, verður nummarið á bátinum og ein heilt neyv knattstøða eisini uppgvin av sær sjálvum.

Don Petersen sigur eisini, at tað ber eisini til at fáa tól umborð, sum eitur EPIRB.

– So títt og knapt hetta tólið verður vátt, tvs, kemur í sjógv, fer tað at senda neyðarkall av sær sjálvum.

– So møguleikarnar at tryggja seg eru góðir, men tíverri eru tað nógvir, sum als ikki brúka hesar møguleikar, hvørki teir, sum eru lógarkravdir og enn minni teir, sum tað ber til at fáa sær afturat.

– Eg veit ikki um tað er tí, at teir ikki taka trygdina í nóg stórum álvara. Men tað er eisini ein sannroynd, at tað er frægari summastaðni í Føroyum enn aðrastaðni.

Don Petersen heldur, at tað kann hava samband við, hvussu lætt tað er hjá útróðrarmonnum at sleppa á skeið í hesum viðurskiftum.

– Men vit kunnu tíverri ikki annað enn staðfesta, at hetta er ein veksandi trupulleiki hjá bjargingarmyndugleikunum, men ikki minst hjá teimum sjálvum, sum koma í neyð.

Og hann heldur, at einasti máti at koma hesum til lívs, er at upplýsa og at geva øllum møguleika at sleppa á skeið í økinum, har teir búgva.

4.500 prógv

Don Petersen sigur, at leikluturin hjá Fjarskiftiseftirlitinum er, millum annað, at vera próvdómari, tá ið skeið eru og at geva radioloyvi til bátin og loyvi til menninar at brúka radioútgerðina.

– Vit hava latið eini 4.500 loyvi, men trupulleikin er, at menninir, ið standa sum próvhavarar, men at teir, sum í veruleikanum eru við bátunum, eru aðrir menn, sum ikki duga at brúka útgerðina.

Men hann skoytir eisini uppí, at tað vísir seg, at trupulleikin er størstur á teimum minnu bátunum. Á teimum størri útróðrarbátunum er støðan frægari, men ikki nøktandi og umborð á teimum stóru skipunum er støðan heilt góð.

Óráð við fartelefonum

Hann nevnir eisini hetta, at fólk í størri og størri mun seta álitið nú á fartelefonirnar.

– Fartelefonir eru hentar at hava umborð sum alternativt samskiftisamboð, men tær eru als ikki nøktandi tá ræður um neyðstøður á sjónum.

– Tær hava t.d. ongan neyðknøtt og í eini knappari vending er skjótt at trysta skeivt nummar.

– Tað er eisini nógva staðni, at fartelefonin als ikki røkkur, tí onki net er og tí eru tað óráð hava fartelefon sum einasta neyðsamskiftisamboð umborð á bátum og skipum, sigur Don Petersen.